## VALGREINAR

# Nøkur aðalmál

**Terji Rasmussen**
*valevni sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy*



Musikkskúlin skal hava meira at arbeiða við. Sum nú er, er bíðilistin til tær ymsu instrumentvalgreinirnar alt ov langur. At áhugin er so stórur millum børn og ung er at gleðast um. Men um hugurin skal vara, mugu vit smíða meðan jarnið er heitt og bera so í bandi, at møguleiki eisini verður hjá teimum at menna seg á ljóðførinum. Hetta skal eisini síggjast sum ein íløga í tað føroyska tónleikalívið.

Arbeiðast skal fram ímóti at fáa spælistøð kring landið upp at standa. Hetta skulu vera støð, har tónleikurin er í miðdeplinum. T.v.s. tónleikararnir skulu sleppa at spæla teirra egna tónleik, líkamikið hvørja sjangru tosað verður um. Hetta er eisini við til at menna tónleikararnar og sjálvan tónleikin. Eg haldi tó, at hetta er eitt kommunalt mál, men landið eigur eisini at geva sítt fíggjarliga íkast til endamálið.

Almannaverkið skal vera munadyggari. Hetta kann møguliga gerast við at umskipa ta bulmiklu miðfyrisitingina, soleiðis at peningurin rennur betur út í økini, har hann er ætlaður.

Tey ungu undir 18 ár, sum ikki megna at fóta sær í samfelagnum, eiga at fáa fleiri møguleikar fyri viðgerð. Hetta eru børn og ung við psykososialum trupuleikum. Alt hetta virksemi eigur at fara fram í høvuðstaðarøkinum av tí einfaldu orsøk, at tað er her tað sindrið av ekspertisu, sum er á umráðnum, finst.

Tá ið tørvur er á víðari viðgerð, eftir at tey eru vorðin 18 ár, eigur hetta eisini at kunna lata seg gera. Sum nú er, er als einki tilboð til henda bólkin.

Barna- og ungdómspsykiatri skal setast í verk sum skjótast. Tað líkist ongum, at vit senda hesi fólk av landinum, har eingin av teirra nærmastu er at vera um tey.

Føroyar eiga at gerast meira sjálvbjargnar. Sjálvstýrisleiðin eigur at halda fram, men umráðandi er, at øll í landinum hava tað gott á leiðini. Bert á henda hátt ber til at fáa fjøldina við í tilgongdini, og tað er jú hóast alt fólkið, sum í seinasta enda avger framtíð Føroya.

Umhvørvið má og skal setast í hásæti. Kyotosáttmálin eigur at verða settur í gildi sum skjótast. Aðrar orkukeldur eiga at verða kannaðar. Upplýsing um, hvussu vanligi borgarin aktivt kann taka lut í at avmarka dálkingina, eigur at verða sett í verk, og tað eigur at fáa avleiðingar, tá fyritøkur av vansketni elva óneyðuga dálking.

Fosturtøkulógin eigur at verða dagførd. Tað skal gevast størri rúmd fyri kvinnuni í eini komandi dagføring av lógini. Samstundis eiga vit tó eisini, at styrkja um upplýsing og duga betur at hjálpa mammuni, tá barnið er komið í verðina.

Tá foreldur hava átt børn fyrr sum eru tikin frá teimum, eiga vit at gera skjótt av og syrgja fyri at nýfødda barnið fær ein líkinda uppvøkstur.

Tá tosið snýr seg um skrásett parlag, eru fólk ofta skjót at rópa upp um, at eingin samkyndur eigur at verða vælsignaður av presti. Men tað er jú als ikki tað, málið snýr seg um. Tað eigur at vera upp til kirkjuna at avgera. Skrásett parlag snýr seg bara um, at tvey av sama kyni, ið eru góð við hvønn annan, skulu kunna fáa pappír uppá at teir ella tær hava somu rættindi mótvegis hvørjum øðrum sum øll onnur, ið búgva saman. Hetta skal vera teimum væl unt.

Tekur tú undir við hesum sjónarmiðum, eigur tú at seta kross við eitt av valevnum Sjálvstýrisfloksins.

Hvør kann? D kann!

# Íverksetan

**Arni Abrahamsen**
*valevni Miðfloksins í Eysturoynni*

Nýliga bleiv sendingin Reyðargullið send í SVF, hetta var ein frálík sending, sum Zacharis Hammer hevði lagt til rættis. Í hesi sending blivu vit enn einaferð mint á, hvønn týdning tað hevur fyri samfelagið, at tað finnast persónar, sum hava dirvi og árræði at fara undir nýggjar vinnur.

Hvat var okkara samfelag uttan persónar sum John Dam, Eiler Jacobsen, Kjølbro og nógvar aðrar? Allir persónar, sum hava havt ómetaligan stóran týdning fyri okkara vinnulív og útflutning. Ein týdningur, sum ikki kann metast í pengum.

So nógv sum vit virðismeta hesar persónar, reisa standmyndir og uppkalla vegir eftir hesar menn, so kann ikki sigast, at samfelagið annars ger nógv fyri at fremja íverksetanarhugin. Tað er á ongan hátt lætt í dag at fara undir nakað nýtt. Tað er nógv ymiskt, ið skal fáast uppá pláss - ikki minst um fígging skal til, og tað skal tað í flestu førum. Peningastovnarnir krevja bæði eitt og annað frá íverksetaranum, áðrenn fígging kann latast. Fyri tey allar flestu, er hetta alt ov trupult at yvirskoða, og lítil hjálp er at heinta frá tí almenna. Tí fara nógv góð hugskot fyri skeytið - hugskot, ið kundu verið við til at økt um útflutningsvirði, umframt at skapt arbeiðspláss.

Um vit t.d. hyggja at Danmark, so finnast har nógvar ymiskar ráðgevingarskipanir og stuðulsskipanir til íverksetarar. Hetta er nakað vit kundu lært nakað av. Vit áttu í Føroyum at statsa nógv meira uppá at skapa grundarlag fyri íverksetarar, at seta síni hugskot í verk.

At TK-stovan letur aftur, er einki minni enn eitt bakkast í hesum høpi. Vit áttu í staðin at varðveitt eina tílíka almenna ráðgevingarskipan, um hon so kanska skal endurskoðast í mun til í dag. Harumframt áttu vit at umhugsað, um ikki ein ella onnur stuðulsskipan skal setast í verk, soleiðis at tað gerst lættari hjá íverksetarum at seta síni hugskot í verk.

Tað er altíð lætt at heiðra og viðurkenna ein persón og eitt avrik, tá viðkomandi hevur prógvað í verkið, at tað bar til, men ein stuðul til at seta hugskotið í verk, hevði ivaleyst verið nógv meira verdur.

Miðflokkurin ynskir at arbeiða fyri at peningur kann setast av, til at stuðla íverksetan av virksemi.

Les meira á
heima.olivant.fo/~arnia

# Persónsskattur

**Bárður Nielsen**
*valevni Sambandfloksins í Norðstreymoy*



Vit hava í dag ein progressivan landskattastiga, ið ger, at vit gjalda upp í móti 60% í marginalskatti av tí vit forvinna omanfyri kr. 170.000. Tað at ein lønmóttakari ongantíð veit, hvat hann skal gjalda í skatti av næstu lønini ger, at vit ikki hava álit á okkara skattaskipan, og hervið eru rættiliga nógv fólk ónøgd við okkara skattaskipan. Endamálið við einari progressivari skattaskipan er, at teir breiðastu herðarnar, skulu bera tær størstu byrðarnar, men veruleikin við verandi skipan er ein annar og kemst hetta einamest av, at skipanin ikki hevur fylgt við lønarvøkstrinum og tískil er afturúrsigld. Niðanfyri verða dømir víst um vansarnar við verandi skipan, og hvussu vit mæla til, at hesir trupulleikar kunnu loysast, so at fólkið aftur fær álit á okkara skattaskipan.

### Skattatrýstið økt - hóast skattalættar

Vit hava seinastu árini fingið skattalættar mestsum á hvørjum ári, men hóast hetta er samlaða skattatrýstið økt við tveimum prosentum. Tað er farið frá 36% í 1997 upp á heili 38% í 2003, hetta hóast kommunurnar í sama tíðarskeiði hava lækkað skattin við umleið einum prosenti. Við øðrum orðum kann sigast, at landsskatturin er øktur við trimum prosentum hesi árini, frá 18,5 % í 1997 til 21,5% í 2003.

Eftir stendur spurningurin, hvussu ber hetta til, vit hava jú fingið skattalætta á hvørjum ári og tilsamans eru skattalættar givnir uppá fleiri hundraðtals milliónir. Svarið liggur í tí progressiva skattastiganum hjá landinum, ið hevur eina innbygda skattahækking, soleiðis at um lønirnar í samfelagnum hækka, og tað gera tær vanliga, er neyðugt við einum sokallaðum skattalætta fyri at halda skattinum á sama støði. So allir skattalættarnir, ið givnir hava verið hesi seinnu árini, hava ikki verið nokk til at dagført progressiva skattastigan.

### Land og kommunur

Landsskatturin er progressivur, tað merkir at gjaldast skal ein størri og størri partur av síðst forvunnu krónu í skatti, meðan kommunuskatturin er proportionalur við einum innbygdum botnfrádrátti uppá kr. 22.000, og merkir hetta, at av allari inntøku omanfyri kr. 22.000 verður goldin ein eins stórur partur í skatti.

Hetta hevur viðført, at so hvørt sum lønirnar eru hækkaðar hevur landið fingið ein størri part av samlaða skattinum og kommunurnar fáa framvegis tað sama. Úrslitið av hesum er, at landskassans partur av skattinum er hækkaður við trimum prosentum, meðan kommunurnar, orsakað av at tær hava lækkað skattin, fáa eitt prosent minni av samlaða skattinum.

### Arbeiðaralønir

Arbeiðaralønirnar, ið ikki kunnu sigast at hoyra til ein høgan lønarbólk, hava eisini merkt eitt økt skattatrýst uppá tvey prosent, og er hetta besta prógvið fyri at verandi skattaskipan als ikki virkar sum ætlað, nevniliga at breiðastu herðarnar, skulu bera størstu byrðarnar. Tað at ein arbeiðari í dag skal gjalda ein marginalskat uppá útvið 60% av síðst forvunnu krónunum er við til at niðurbróta álitið á okkar skattaskipan.

Skattaøkingin av arbeiðaralønum, hevur saman við stóra prístalsvøkstrinum viðført, at nettoinntøkan, tað er lønin eftir skatt, hjá einum arbeiðara við sáttmálaløn, seinastu árini hevur verið væl lægri enn um nettoinntøkan í 1997 fylgdi prístalinum. Í ár 2000 var nettoinntøkan hjá einum arbeiðara heili kr. 8.000 lægri enn um nettoinntøkan frá 1997 fylgdi prístalinum. Grundin til at hetta kanska ikki merktist so væl, er at tað var meir arbeiða í ár 2000 enn í 1997, og soleiðis bleiv samlaða nettolønin hægri.

### Vansar við marginalskatti

Tað at marginalskatturin í dag er upp í móti 60% ger, at fólk við miðalinntøkum ikki hava serligan hug at arbeiða eyka, tí at at tað sum verður eftir til borgaran einans er 40%, meðan restin fer í skatti.

Ein annar trupulleiki við so høgum skattatrýsti er, at fólk við hægri útbúgving og høgum inntøkum ikki støðast í Føroyum og heldur velja at seta búgv í øðrum londum við lagaligari skatti. Við hesum forða vit fyri at savna eina vitan her á landi, ið kann verða við til nýskapan innan okkara vinnulív, soleiðis at vit fáa fleiri bein at standa á. Royndir frá londum við høgum skattatrýsti vísa eisini, at "svart arbeiði" vindur uppá seg, og kemur sostatt ikki gjøgnum skattaskipanina yvirhøvur.

### Broyting er alneyðug

Fyri at fólk aftur skulu fáa álit á okkara skattaskipan er neyðugt við einari radikalari broyting. Sambandsflokkurin hevur eina ætlan fyri hvussu hetta kann gerast og inniber hon í høvuðsheitum at marginalskatturin skal verða 40% ístaðin fyri 60%, sum nú er. Fyri at øll skulu fáa ein lætta er neyðugt at gera hetta í stigum yvir nøkur ár.

Við at skapa álit á okkara skattaskipan, vil áhugin hjá fólkinum fyri at gera ein eyka innsats og skapa framburð vaksa, og hetta fer at hava við sær, at samfelagshjólini fara at mæla skjótari.

Tín trygd fyri vælferð, set X við Sambandsflokkin.

Bilar
Nr. 9 • hósdagur • 15. januar 2004 • 78. árg.



**SKODA FABIA 1,2 MPI**
Árg mai 2003, Km 5.600. Bilurin er bert 8 mánaðir gamal, sera vælhildin og lítið brúktur.
Kr. 105.000.
**Tel. 216135**



**VW POLO**
Hvítur, í sera góðum standi. Árg. 5/98, koyrt 90.000 km. til sølu fyri uml. 80.000 kr.
**Tel. 448595 ella 217231**

# Fiat Punto við nýggjum andliti




*Fiat Punto klárur til annað umfar. Størsta designbroytingin er framman við t.d. størri lyktum og kølaragittari*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Punto hevur servostýring við City-funktión til býkoyring*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Punto hevur í fleiri ár verið ein av mest seldu bilum í Evropa í sínum klassa. Men kappingin er hørð og fyri at fylgja við, hevur bilurin nú fingið eina "facelift", sum umfatar nýtt design framman og nógvar aðrar broytingar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Fiat Punto er nú dagførdur, og tað man fyrst leggur merki til, er, at hann sær annarleiðis út framman við størri lyktum og kølaragittari. Annars eru nógvar aðrar broytingar, kvaliteturin er eisini betri. Tað merkist best við at koyra bilin og við at lata hurðar og lúkur upp og aftur.

Punto hevur verið ein av mest seldu bilum í sínum klassa í Evropa, og kemur tað m.a. av, at bilurin er ein av teimum rúmligastu og prísirnir kappingarførir.

Eisini er Punto kendur sum ein væl egnaður býbilur, hann var ein av fyrstu bilunum við City-funktión, har man við at trýsta á ein knøtt ger at servostýringin blívur munandi lættari. Hetta kemur serliga væl við til býkoyring og parkering.

ABS bremsuskipan við elektroniskum bremsukraftdeilara (EBD) er standard eins og airbag framman, í síðunum og windowairbag. Undirvognurin er ikki nógv broyttur, og koyrieginleikarnir eru eins og áður sera góðir.

### Active, Dynamic og Sporting

Punto fæst við trimum ymiskum bensinmotorum við ávikavist 60, 80 og 95 hk og einum Multijet common-rail dieselmotori við turbo og intercooler við 70 hk. Hesin dieselmotorurin fær sera góð ummæli, hann koyrir 22,2 km/l, er kvikur og ljóðleysur. Motorurin verður eisini brúktur í øðrum bilmerkjum, sum General Motors varða av.

Instrumentborðið er eisini broytt og kvaliteturin er betri. Bilurin fæst í trimum útgávum hvat útgerð viðvíkur: Active, Dynamic og Sporting. Sporting hevur t.d. sportsetur, alu-look í instrumentborðinum, hvít instrumentir, aircondition og 15" sportfelgur. Bilurin verður gjørdur við trimum ella fimm hurðum.




*Baklyktirnar á nýggja Punto eru størri*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Fiat Punto 1,2 Acitve

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1,2 litur 4 syl. bensin við 60 hk |
| 0-100 km/t: | 14,3 sek |
| Bensinnýtsla: | 17,5 km/l |
| Dekkstødd: | 165/70-14 |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 384,0 cm |
| Breidd: | 166,0 cm |
| Hædd: | 148,0 cm |
| Eginvekt: | 860 kg |
| Viðførisrúm: | 264 litrar |
| Prísur: | kr. 147.000,- |
| Søluumboð: | Bilfríðkan<br>v.Velbastaðvegin<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 217300 / 317300<br>www.bilfríðkan.fo |